## Byrial mátti tetta Horsens-verjuna



Tað gekk illa hjá AC Horsens í fyrsta dystinum í Viasat Cup, har tey donsku superligaliðini kappast um ein vinning upp á 3 milliónir krónur. AC Horsens var á heimavølli ímóti Brøndby og tapti 4-1. Longu áðrenn hálvleik hevði Brøndby gjørt fýra mál, og í hálvleikssteðginum vóru Johan Byrial Hansen og ein liðfelagi sendir á vøllin at venda gongdini. Tað eydnaðist teimum at halda tætt í verjupartinum, men AC Horsens fekk einki mál afturat.

## Gunnar er skaddur

Einki mál kom í 1. deildardystinum ímillum Frem og Fredericia í gjár. Fyri fyrstu ferð í ár spældi Jónas Tór Næs ikki við hjá Frem, meðan Atli Gregersen sat á beinkinum allar 90 minuttirnar. Gunnar Nielsen, sum hevur verið eykamálmaður, var ikki við í ferðalagnum til Fredericia. Gunnar er skaddur og hevur fingið boð um at halda seg burtur frá fótbólti í eina viku.

Eftir javnleikin í Fredericia liggur Frem sum nummar 8 av teimum 16 liðunum í næstbestu deildini í Danmark.

# Skive kroystir Lundberg at útseta

**Ætlanin var, at danski álopsspælarin, sum KÍ hevur gjørt avtalu við, skuldi koma henda vegin í morgin, men nú er ferðin útsett til fríggjadagin í næstu viku**

KÍ ÁLOPSSPÆLARI
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

KÍ hevur trupulleikar at gera mál. Tað varð aftur staðfest sunnudagin, tá ið klaksvíkingar bara skoraðu eina ferð, hóast teir høvdu fleiri møguleikar.

Seinnapartin fríggjadagin boðaði KÍ frá, at teir høvdu gjørt avtalu við 35 ára gamla danska álopsspælaran, Christian Lundberg, um, at hann skal spæla í Klaksvík tað, sum er eftir av hesum kappingarárinum.

Aksel Johannesen, formaður í KÍ fótbóltur, hevur havt samskiftið við danska spælaran. Aksel hevði vónað, at Christian Lundberg fór at koma henda vegin í morgin, men nú staðfestir hann, at tað verður ikki fyrrenn í næstu viku:

– Hann spælir í Skive, sum er fremst í Danmarksseriuni, og teir vilja hava hann at vera har, inntil teir eru fluttir upp. Skive er oddalið, og teir vunnu í vikuskiftinum, tá ið Christian Lundberg skoraði eitt mál, og John Petersen, hjálparvenjarin á landsliðnum, skoraði tvey mál. Teir liggja væl fyri, men uppflytingin er ikki tryggjað, og tí er fráferðin úr Danmark útsett, sigur Aksel Johannesen.

Christian Lundberg harmast um, at tað ikki ber til at koma í hesi vikuni:

– Eg hevði fegin viljað verið við í fjórðingsfinaluni hósdagin og í landskappingardystinum leygardagin, men tað ber ikki til. Eg eri ikki sáttmálabundin í Skive. Men eg eri uppvaksin her, og tað eru fólk í og kring felagið, sum hava stuðlað mær rættuliga væl, og tað kann eg ikki bara renna undan. Vit skulu spæla í vikuskiftinum og so aftur hósdagin. Tað hevði verið burturvið at brent brýr her nú, sigur Christian Lundberg, sum harmast, tá ið hann frættir, at KÍ bara fekk eitt mál á heimavølli móti GÍ.

Teir megna ikki at skjóta mál. Tí hava teir keypt teg. Fert tú at skjóta málini, sum skulu til?

–Tað er sjálvandi trýst at fáa lagt á seg, tá ið tað verður sagt upp á handa mátan. Eg eri vanur við, at tað verður roknað við, at eg skal skjóta mál, og eg plagi at skjóta mál. Tað havi eg eisini gjørt í Skive, har eg í átta teimum seinastu dystunum havi skorað níggju mál. Eg vóni og vænti, at eg eisini fari at gera mál í Klaksvík.

**Hvat veist tú um føroyskan fótbólt?**

– Einasta ferðin, at eg havi verið í Føroyum, var í 1991, tá ið eg var á Vejle liðnum, sum spældi móti landsliðnum í Havnini. John Petersen og eg spæla saman her í Skive, og eg tosi sjálvandi við hann. Eg veit um føroysku spælararnar í donskum fótbólti. Eg rokni Toda Jónsson at vera ein tann besta spælaran, sum yvirhøvur hevur verið í superliguni. Tað var harmuligt, at skaðar skuldu darva honum so nógv. Hann kundi spælt alla staðni. Og so veit eg um Andrew av Fløtum, Jón Róa Jacosben og Súna Olsen.

**Hvat støðið roknar tú við at koma til?**

– Betri enn tað eg nú spæli á. Eg veit tað ikki, men eg rokni við, at bestu liðini í Føroyum kundu spælt í næstbestu donsku deildini, sigur Christian Lundberg, sum fyribils er bundin at KÍ restina av hesum kappingarárinum.

– Eg vóni, at tað fer at hilnast so mikið væl, at eg kann halda fram í Klaksvík næsta ár. Men nú fáa vit at síggja. Eg taki hetta sum stóra avbjóðing og persónliga uppliving.



*– Eg eri vanur við, at tað verður roknað við, at eg skal skjóta mál, og eg plagi at skjóta mál. Og eg vóni og vænti, at eg eisini fari at gera mál í Klaksvík, sigur maðurin, sum í næstum skal styrkja um KÍ-álopið* Mynd: Scanpix

### Søgan

Christian Lundberg hevur spælt í superliguni, har hann hevur umboðað FC Midtjylland, AB, eitt legg í grikskum fótbólti, AaB og Randers FC. Har var hann loystur frá sáttmálanum í fjør:

– Eg havi altíð havt tað sum blomman í egginum. Í fjør fekk eg trupulleikar við hjartanum, sum góvu seg til kennar við, at eg kendi meg innistongdan og trongdan. Læknarnir søgdu, at eg hevði eyka kaðal úr hjartanum. Eg varð skurðviðgjørdur, og tað gekk fínt. Men hetta tyngdi meg sinniliga í meiri enn eitt hálvt ár, og eg bað um at vera loystur úr sáttmálanum við Randers, hóast vit høvdu spælt okkum í fjórðingsfinaluna í steypakappingini, sum Randers nú hevur vunnið, og hóast vit løgu til at flyta upp. Eg gavst at spæla fótbólt. Eftir tríggjar mánaðir kendi eg meg væl, og síðani havi eg hjálpt Skive, og nú kom so tilboðið úr Klaksvík.

**Hvussu ert tú fyri?**

– Væl hóast tað resta tíggju prosent í toppformin. Nógvu royndirnar telja rætta vegin, og eg vóni, at tað fer at bera mær til at sleppa beinleiðis inn á KÍ liðið. Har fari eg at verða vigaður út frá málskjótingini. Tað skilji eg væl, og eg stúri ikki fyri tí, sigur maðurin, sum í Klaksvík er keyptur at verða bombari á sama hátt, sum eitt nú Kurt Mørkøre var tað!

## Hann skorar mál

Í Skive er tað John Petersen, sum hevur verið álopsmakkari hjá Christian Lundberg hetta kappingarárið. Eitt áleyparapar, sum higartil hevur skotið Skive væl og virðiliga í toppin á stigatalvuni.

Og tá núverandi hjálparvenjarin hjá føroyska A-landsliðnum verður biðin um eina lýsing av komandi KÍ-spælaranum, fellur svarið alt fyri eitt.

– Hann skorar mál. Tað hevur hann altíð duga, og hóast hann fyllir 36 næstu ferð, so hevur hann ikki gloymt hetta kynstrið. Kanska best undirstrikað við, at hann hevur skorað í átta av teimum níggju dystunum, sum vit hava spælt í vár.

– Annars er at siga, at hann arbeiðir hart fyri liðið og hevur eitt gott skot við báðum beinum. Og hann uppsøkir altíð málmøguleikarnar, sigur altso John Petersen.

**-mørk**

## Skála-ÍF í kvøld

Stevnuhýrurin var eingin serligur á Skála sunnudagin. Leygarkvøldið gav Skála boð um, at stevnuróðurin varð av ongum, nú veðurlíkindini vóru so vánalig, og sunnudagin fekk fótbóltsdysturin millum Skála og ÍF somu lagnu.

Dagfinn Olsen, dómari, var ikki í iva, og longu ein tíma undan dystarbyrjan, staðfesti hann, at tað var ikki spælandi.

Saman við feløgum og dómara hevur FSF longu ásett nær dysturin skal spælast, og verður hetta ætlandi í kvøld klokkan 19.

**-mørk**